Gomul á Tvøroyri:

# Vit eru koyrd á dyr

**Pensjónistafelagið á Tvøroyri hevur nú mist hølini, tey hava havt í 13 ár. Tey eru ógvuliga vónbrotin av kommununi**

ELDRAVIÐURSKIFTI
*Áki Bertholdsen*

**Tvøroyri:** – Vit eru koyrd á dyr.

Í Pensjonistafelagnum á Tvøroyri eru tey ógvuliga vónbrotin av Kommununi.

Beint fyri jól mistu tey hølini, sum tey hava havt í samfull 13 ár.

Men nú hevur kommunan gjørt av, at dagrøktin skal hava hølini burturav og at tað ikki er pláss fyri pensjonistunum eisini.

Ístaðin hevur kommunan víst teimum á eina aðra loysn, men tað loysnina skoyta tey ikki um.

### Eitt vónbrot

– Hetta er ein dáragerð ímóti okkum, sigur Torbjørn Lisberg, sum er formaður í pensionistafelagnum HØFT, sum telur limir bæði úr Hvalba, Trongisvági, Øravík og Fámjin.

Tað var annars ein stórur dagur í pensjónistafelagnum í 1989, tá ið tey fingu boð frá kommununi um, at tey skuldu fáa teirra egna høli at vera í. Talan var um eitt høli í veghæddini í skúlanum í Trongisvági, sum nú skuldi vera pensjonistahøli burturav.

– Síðani hava vit brúkt heilt nógvan pening uppá høli, sigur Torbjørn Lisberg. Felagið hevur bæði sett skilaveggir upp, lagt streym og vatn inn, keypt køk, hvítvørur, borð, stólar, køksbúnýti og myndir umframt at tey hava málað og annað fyri at gera hølini so hugnalig og brúkilig sum gjørligt.

Tey fyrstu árini gekk alt upp á stás i nýggju hølunum.

– Men so komu boð frá kommununi um, at dagrøktin skuldi sleppa at brúka hølini ein dag um vikuna til børnini at vera í.

Tað gekk so eisini eina tíð, men so skuldi dagrøktin vera har tveir dagar um vikuna.

– Vit skrivaðu til kommununa í februar í ár fyri at koma á tal við Býráðið um hølini. Men vit fingu ongantíð svar aftur og í oktober ryktu vit eftir svari. Beint fyri jól kom so svarið og tað var, at vit eru uppsøgd úr hølunum, tí nú skal dagrøktin hava tey burturav.

– Ístaðin hevur býráðið bjóða okkum at vera í matarhøllini í skúlanum eitt kvøld um mánaðin, har kommunan skal bjóða okkum kaffi og kakur.

Torbjørn Lisberg sigur, at hetta er ein loysn, sum tey ikki vilja vita av.

Fyri stuttum hevði pensjonistafelagið eitt slag av kreppufundi í Øravík um støðuna og har var einmælt samtykt, at loysnina sum kommunan hevði víst teimum á, vildu tey ikki hava.

Formaðurin sigur, at tey eru ómetaliga vónbrotin av kommununi.

– Høvdu býráðslimir av øllum illum tosa við okkum um støðuna, kundi tað verið, men vit vita onki, fyrrenn vit fáa eina uppsøgn uppá 8-10 reglur eftir at hava bíðað í 10 mánaðir eftir svari.


*Pensjónistarnir eru ógvuliga vónbrotin av at hava mist hølini. Her er tað formaðurin, Torbjørn Lisberg, sum greiðir frá støðuni*

### Býráðslimur lovaði hølini

Serliga dátt við kemur uppsøgnin nú, tí tað er ikki longri síðani enn síðst í apríl, at tey fingu skriv sendandi frá Sverra Midjord, sum er formaður í Sosialu nevnd hjá býráðnum.

– Í skrivinum ger hann púra greitt, at vit skulu varðveita høli, sum vit høvdu, til ætlaða sambýlið er bygt og at vit tá skuldu fáa høli har.

Men nú halda tey seg hava lúrt býráðslimin av, tí hetta var nakrar fáar dagar fyri løgtingsvalið og saman við hesum brævinum fylgdi eisini ein áheitan um at velja seg til løgtingsvalið beint aftaná.

– Men lyftini frá sosialnevndarformanninum hildu so ikki og nú eru vit húsvill. Vit vita heldur ikki, hvat vit skulu gera, við alt, vit eiga og sum er í hølunum, sigur Torbjørn Lisberg.

Á fundinum í Øravík fekk nevndin heimilid at arbeiða víðari við málinum. Men hvat fer at henda er ikki greitt.

Sí eisini greinina niðanfyri.

# Hava fingið eitt nógv betri tilboð

**Tá ið pensjonistarnir mistu hølið, fingu tey ístaðin eitt nógv betri tilboð frá kommununi, sigur borgarstjórin á Tvøroyri**

ELDRAVIÐURSKIFTI
*Áki Bertholdsen*


*Finnleif Guttesen heldur ikki, at pensjónistarnir á Tvøroyri áttu at verið so vónbrotnir, tí samstundis sum tey mistu eini høli, fingu tey eini nógv betri ístaðin*

**Tvøroyri:** Tað er rætt, at pensjonistarnir hava mist hølið, tey hava verið í. Men afturfyri fingu tey eitt nógv betri tilboð.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, skilir ikki, hví pensjonistarnir eru so vónbrotnir av, at teir hava mist hølið.-sí greinina omanfyri.

– Tað er samtykt í býráðnum, at hereftir skal dagrøktin hava hølið. Men aftur fyri hava vit bjóðað pensjonistunum at brúka matarhøllina í skúlanum í Trongisvági ókeypis eitt kvøld um mánaðin, samstundis sum kommunan bjóðar kaffi og kaku og tað eru nógv betri sømdir enn tey høvdu frammundan.

Finnleif Guttesen sigur, at dagrøktin hevur leingi havt tørv á einum høli og í løtuni hevur kommunan onki til taks.

– Tí ætlaðu vit, at pensjonistarnir og dagrøktin skuldu hava hølini í felag. Men veruleikin er, at pensjónistarnir hava verið rættiliga ónøgdir um nógv viðurskifti, so býráðið gjørdi av at taka eina støðu í málinum fyri at sleppa undan áhaldandi trupulleikum.

– Og støðan bleiv so til fyrimunar fyri dagrøktina og tað er ev ymsum orsøkum.

Eitt er, at Dagrøktin hevur átrokandi brúk á hølum. Eitt annað er, at pensjonistarnir hava bert brúkt hølið eitt kvøld um mánaðin. Og kommunan kann ikki hava eini høli, sum bara verða brúkt eitt kvøld um mánaðin og sum síðani skal skulu standa tóm og óbrúkt 29 dagar um mánaðin.

– Men vit sleptu ikki pensjonistunum uppá fjall, tí vit góvu teimum eitt nógv betri tilboð, enn tey høvdu frammanundan.

Finnleif Guttesen sigur, at vilja tey ikki taka av, er tað spell, men tað gerst ikki við.

Hann vísir annars á, at pensjonistafelagið er fyri alla norðaru helvt og hann veit ikki um tað ber til at finna nøktandi høli í onkrari aðrari bygd.

– Í øllum førum hevur kommunan betalt fyri bussin, tá ið pensjonistarnir hava havt fund, so at tey hava ókeypis flutning til fundirnar.

– Og tað kunnu vit framhaldandi gera, hóast tey finna sær onkur onnur høli, tí vit eru altíð til reiðar at stuðla, sigur Finnleif Guttesen.

Men formaðurin í sosialu nevnd í býráðnum, Sverri Midjord, hevur skrivliga lovað teimum at varðveita hølið, til nýtt sambýlið er bygt ella keypt?

– Tað er ikki viðgjørt í býráðnum so tað má standa fyri hansara egnu rokning, sigur Finnleif Guttesen.

Hvussu verður við tí, sum pensjonistarnir eiga, og teimum útreiðslum, tey hava havt, veit hann ikki, men tað málið mugu tey so eisini loysa, sigur hann.

Sverri Midjord sigur, at hann stendur við, at hann lovaði teimum høli. Men tá ið málið kom fyri býráðnum var hann sannførdur um, at tað var ein betri loysn hjá pensjonistunum at fáa matarhøllina, serliga tí at tá hava tey hana fyri seg sjálvan.

– Men eru tey misnøgd er ongin ivi um, at vit finna eina loysn og eg havi nú reist málið aftur i býráðnum, sigur Sverri Midjord.



# Prix-pass, bussar og ferjur


*Mentanarhúsið í Fuglafirði verður karmur um øll tey innleiðandi umførini í Prix Føroyum, og tí skulu nógv fólk ivaleyst ferðast við bussi og ferjum*

**Fyrireikararnir geva nú teimum, sum ætla sær til øll innleiðandi umførini í Prix Føroyum, møguleika fyri at spara pengar upp á atgongumerki. Atgongumerkini verða sett til sølu týskvøldið**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Atgongumerkini til Prix Føroyar tónleikakappingina fara at kosta 130 krónur. Men tað eru pengar at spara, um tú keypir eitt sonevnt Prix-pass, sum gevur atgongd til øll tey seks innleiðandi umførini. Hetta Prix-pass kostar 490 krónur, og fæst til keyps í Norðurlandahúsinum og í Kuningarstovunum kring landið.

Tað sleppa 600 fólk inn til hvørja kapping, sum verður hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og atgongumerkini til fyrstu umførini vórðu sett til sølu týskvøldið. Sølustøðini eru hesi: Eysturoyar Kunningarstova, Kunningastovan í Havn, Kunningarstovan á Sandi, Kunningarstovan á Tvøroyri, Kunningarstovan í Fuglafirði, Norðoya Kunningarstova, Mylnan í Miðvági og Shell í Gøtudali.

### Samband

Tað verður eisini buss- og ferjusamband til kappingarnar í Fuglafirði. Bussar koyra av Toftum, Strondum, úr Vestmanna, Sørvági og Havn í sambandi við innleiðandi umførini. Eisini fer bátur at sigla úr Fuglafirði klokkan 03.45 til Klaksvíkar eftir hvørt umfar. Ferðaseðil fæst í Norðoya Kunningarstovu.

Strandferðslan fer at lata 15% í avsláttri av ferðaseðlum, um tú hevur eitt Prix-atgongumerki at vísa fram. Hesin avsláttur er bert galdandi tann leygardagin, Prix-atgongumerki skal brúkast. Kunningarstovan á Tvøroyri fer at selja ferðaseðlar til Havnar og aftur við serligum avsláttri.

# Skótin í Bø á toppinum

**Sangurin hjá Skótanum í Bø reyk beinleiðis inn sum nummar 1 á 15 teimum bestu leygarkvøldið. Sangurin er einasta føroyska umboðið á listanum hesa vikuna**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Tað er nýggjársaftan (tjikkilakka). Soleiðis kallast sangurin, sum er nummar 1 á 15 teimum bestu hesa vikuna. Sangin syngur Skótin í Bø, sum er ein av ørvitisknokkunum í Pipari og Salt.

Sangurin var eykalag fyri viku síðani, og tað var einki at ivast í, hvat lurtararnir hjá15 teimum bestu hildu um hendan sangin. Hann fór beinleiðis inn á listan sum nummar 1.

Sangurin er einasta føroyska umboðið á listanum í løtuni. Nógvir føroyskir bólkar hava verið inni í hitanum seinastu vikurnar, men nú er bara Skótin í Bø eftir. Einki føroyskt eykalag var hesaferð.

# 4.000 sjófuglar deyðir

**Helst fara einir 20.000 fuglar at doyggja av olju, sum er likin úr "Prestige"**

OLJUDÁLKING
*Beinta Anthoniussen*

Oljudálkingin frá tangaskipinum, "Prestige", hevur higartil kostað 4.000 sjófuglum framvið sponsku strondini lívið, siga spaniólar.

Síðan vanlukkan hendi fyri nøkrum vikum síðan, eru 40.000 fuglar, sum eru raktir av oljudálkingini, savnaðir framvið útnyrðingsstrondini á Spaniu.

Fuglafrøðingar stúra fyri, at bara helmingurin av fuglunum sleppa undan dálkingini við lívinum, og at 20.000 fuglar helst fara at doyggja av oljudálkingini.

Í Spaniu hava fólk mótmælt, at uppruddingararbeiðið eftir, at "Prestige" gekk burtur, hevur gingið so seint.

# Fiskimenn krevja fría kapping um fiskin

**Fiskimannafelagið er sannført um, at kappingarføri er loysnin. - Ikki bert kappingarførið millum føroysk virki, men eisini millum føroysk og útlendskt virki**

FISKAPRÍSIR
*Beinta Anthoniussen*


*Fiskimannafelagið ivast ikki í, at virkini kunnu liva upp til fríu kappingina um fiskin*

- Læran tey síðstu 10-15 árini hevur greitt víst okkum, at tað finst bert ein háttur at fáa "rættan" fiskaprís. Hesin háttur er við at hava kappingina so fría og við so fáum avmarkingum, sum gjørligt.

Hetta sigur Føroya Fiskimannafelag í ársfrágreiðing felagsins, sum varð løgd fram á landsfundi felagsins, 30. desember.

Felagið vísir á, at tað er óneyðgut enn einaferð at minna nakran á tíðina undan 1990, tá ið vit høvdu planøkonomi í fiskavirkisskipanini.

- Men staðfestast kann, at tann kapping, sum vit hóast alt hava fingið, hevur merkt fíggjarligt undur á økinum, har tað rættiliga er komið til sjóndar, hvør munurin er á at spenna seg út, og so ikki at gera tað. Hóast prísirnir kunnu vera í so lágir til tíðir, má roknast við, at hetta er tað, sum vinnan er før fyri at gjalda. Og hetta hevur eisini givið úrslit, so tað munar.

Felagið er sannført um, at kappingarføri er loysnin.

- Ikki bert kappingarførið millum føroysk virki, men eisini millum føroysk og útlendskt virki. Tó virkar tað eitt sindur løgið, at ein slík kapping seinastu tíðina hevur verið frammanað sum ein hóttan móti føroyskum flakavirkjum.

Fiskimannafelagið heldur, at virkini skulu hava møguleika at kappast á jøvnum føti við útlendsku virkini. Eru ójavnar í kappingartreytunum, skulu hesar broytast.

- Vit ivast ikki í, at virkini kunna liva upp til hesa kapping. Tað hava tey víst higartil. Vit hava sera dugnalig fiskavirkisfólk, sum kunnu taka upp hesar avbjóðingar, og sum eisini kunna vísa á, hvar tað skal setast inn fyri at javnstilla kappingina.

Fiskimannafelagið er tí ikki í iva:

Støðan hjá fiskimonnum er púra greið: Frí kapping um fiskin!